KÍ-B68 4-0 (1-0):

# KÍ setti punktum við maner

**B68 vildi spæla við, so talan gjørdist um undirhaldandi síðsta dyst, áðrenn KÍ kvinnurnar fingu gull og steyp og aftur snaraðu hugsanunum út í Europa**



*Triðja árið á rað er KÍ føroyameistari í bestu kvinnudeildini. Tað hevur leingi verið greitt, at KÍ skuldi enda fremst, og leygardagin staðfestu tær so ruddiliga heitið, tá tær vunnu 10. dystin á rað í endaspælinum*



*Stóra VOGUE-steypið hevur nú fingið fast sætið í KÍ-húsinum. Hetta er triðja ferðin á rað, at KÍ vinnur, og tískil hava tær vunni steypið til ognar*

FØROYAMEISTARAR

*orð: Jóannes Hansen*
*myndir: Álvur Haraldsen*

Bara eina ferð áður er tað komið fyri, at eitt felag hevur vunnið FM í kvinnufótbólti trý ár á rað. Tað gjørdi HB í 1993, 1994 og 1995. Nú eru longu fleiri vikur síðani, at tað varð greitt, at KÍ hevur vunnið triðja árið á rað. Spurningurin er so, um tað fer at eydnast hjá teimum komandi ár at seta nýtt met.

Um tað skal metast út frá avrikinum í dýrdarveðrinum leygardagin, tá B68 var í Klaksvík, so tykist tað, sum um fleiri góð fótbóltsár eru í KÍ kvinnunum. Tær eru allar – við einum undantaki – frá fyrst í tjúgunum og niðureftir. Oftast gevast føroysku kvinnurnar tíðliga at spæla fótbólt, men Bára Skaale í KÍ er dømi um, at tað væl ber til at spæla, sjálvt um tveir barnsburðir koma uppímillum, og hinir KÍ spælararnir tykjast framvegis dáma væl at spæla og vinna.

Spurningurin er altíð, um spælararnir framvegis fara at búleikast í heimbýnum. Tað hevði verið undarligt, um ikki onkur úr KÍ fór burtur – í hvussu so er eitt skifti – men fleiri hava arbeiði og skúla í heimbýnum at hugsa um, og tí eru vánirnar góðar fyri, at bulurin á liðnum verður umleið tann sami komandi ár.

Eftir 4–0 sigurin á B68 fingu KÍ kvinnurnar VOGUE steypið til ognar og gullkrónur um hálsin. Tað var lokalt, sum tey siga har norðuri. Fyri FSF handaðu Rúni Heinesen, nevndarlimur, og Ísak Mikladal, aðalskrivari, steyp og gullkrónur til KÍ og bronsukrónurnar til B68.

Eftir dystin, myndatøku og sigursgongd fóru KÍ kvinnurnar á Hereford til døgurða, so í KÍ høllina at syngja eina løtu, og fyri midnátt vóru tær farnar til hús. Europa Cup luttøkan stóð aftur fremst í huganum.

### Spældu við

B68 var ikki komið til Klaksvíkar at grava seg niður og dyrgja eftir málleysum javnleiki. Toftakvinnurnar bjóðaðu av, og harvið fingu lutfalsliga nógvu áskoðararnir undirhald fyri pengarnar.

Rannvá Andreasen setti hol á í 1. hálvleiki við skoti uttanvert brotsteigin í vinstru. So noyddist B68 at verða meiri álopskent. Tær høvdu onkran møguleika, men tað var bara KÍ, sum skoraði mál í 2. hálvleiki. Malena Josephsen økti í fyrsta KÍ álopinum eftir steðgin – B68 verjan kiksaði – so var tað Rannvá, sum umsetti langa sending frá tvíburðarsystrini, Ragnu, og Malena Josephsen staðfesti við skoti úr brotsteiginum.

KÍ vann gull í steypakappingini og landskappingini, og Rannvá Andreasen endaði ovast og Malena Josephsen næstovast á máltindinum. KÍ verður ynskt hjartaliga tillukku, og B68 fær eisini eina heilsan, nú tær fyri fyrstu ferð nakrantíð hava vunnið heiðursmerki í bestu kvinnudeildini.

### Dysturin í tølum

**KÍ-B68 4-0 (1-0)**

1-0: Rannvá Andreasen
2-0: Malena Josephsen
3-0: Rannvá Andreasen
4-0: Malena Josephsen





*Tvær fegnar meistarakvinnur hjá KÍ. Bára Skaale, sum er komin heim at hjálpa til í stóru europeisku avbjóðingini, og Rannvá Andreasen, sum í ár verður avtakari av gylta Adidas-skógvinum*



*Umframt heiðursmerki og steyp fingu leikarararnir eisini hvør sína rósu*



*Ein nerrin liðformaður. Ragna Andreasen kannar eftir, um øll meistaraheitini hjá KÍ nú eru komin við á navnaspjaldrinum*



*At byrja við var eitt sindur av turbolensi á venjarapostinum hjá meistaraliðnum, men eftir at gamli kenningurin, Jón Harald Poulsen, aftur tók við, var eingin slingur í valsinum, og eins og kvinnurnar var venjarin sjálvsagt fegin eftir dystin*

## Stórur svenskur biti á skránni

**Hesa ferð er avbjóðingin hjá KÍ kvinnunum so stór í fyrsta dystinum, sum tað ber henni til at vera**

EUROPA CUP

*Jóannes Hansen*

Í kvøld fara kvinnuligu meistararnir og steypavinnararnir í KÍ undir størstu avbjóðingina í hesum árinum. Heima á landi hevur eingin staðið teimum kurl, men í kvøld tykist uppgávan at vera næstan ómøguliga stór. Kl. 19.30 skal KÍ spæla ímóti svenska Umeå, sum er á heimavølli. Talan er um nógv tað besta kvinnuliðið í Svøríki, og tað sæst aftur í lokala áhuganum, sum er størri, enn hann er aðra staðni fyri kvinnufótbólti.

Ferðalagið úr Klaksvík kom seint mánakvøldið til Umeå. Tær eru sekstan spælarar, Jón Harald Poulsen og Ove Nysted eru venjarar, Amaliel Jacobsen og Sigrid Andreasen taka sær av klæðunum og Odd Færø og Jóan Magnus Høgnesen ella Manni eru ferðaleiðarar. Fyrioterapeutur hjá KÍ er Eyðvør úr Dímun, sum í nógv ár spældi við HB og í donskum feløgum og var ein av fremstu føroysku spælarunum.

Fyrrapartin í gjár vóru KÍ spælararnir og vandu á stadion, har tær í kvøld skulu spæla:

– Tað er rættuliga heystligt her. Tá vit komu vóru hitastigini ikki fleiri enn fýra, men nú eru tey omanfyri tíggju, segði Jón Harald Poulsen úr Umeå fyrrapartin í gjár.

Hvat veitst tú um mótstøðuliðið, sum tit skulu spæla ímóti í kvøld?

– Í síðstu Europa Cup kappingini komu tær í finaluna, har tær taptu 2–0 ímóti Frankfurt. Tað sigur rættuliga nógv. Undan hesi kappingini hava tær fingið tveir finskar spælarar. Tær eru úr Helsinki, sum vit taptu 4–0 ímóti í fjør. Vit ivast ikki í, at mótstøðan verður fantastiska stór í kvøld, men vit fara at gera okkara ítarsta. Lagið er gott, og eg veit, at okkara lið hevur ein framúr góðan hugburð.

### Aftasta mann og ein frammi

Sammett við liðið, sum í fjør var í Europa Cup kappingini, so er KÍ liðið tað sama á flestu plássunum. Tað vil siga, at kvinnurnar hava uppaftur fleiri royndir, enn tær høvdu, tá tær í fjør vóru í Finnlandi. Men tríggir stuðulsspælarar, sum vóru við í fjør, eru ikki við hesa ferð.

– Ragnhild Aas, Kristina Lervig og Anna Müller Jacobsen vóru allar á liðnum, so tað sigur seg sjálvt, at tað hevði komið væl við, um tær hjálptu til. Men vit hava alt hetta kappingarárið vitað, at tær fóru ikki at vera við. Tær, sum hava vunnið steypakappingina og FM heitið, manna liðið hesa ferð. Í flestu førum er púra upplagt, hvør skal manna plássini. Men í onkrum førum eru tað tvær ella tríggjar, sum stríðast um sama plássið. Fyrrapartin mikudagin fara vit at seta liðið, og aftaná døgurða og hvíldina fara vit at hava taktikkfund.

*Hvat verður uppleggið?*

– Vit fara at spæla við Ragnu Andreasen aftanfyri tríggjar verjuspælarar, og Rannvá Andreasen verður hangandi álopsspælari frammanfyri fýra á miðvøllinum og aftanfyri fremsta spælaran, sigur Jón Harald Poulsen.

Undan dystinum hjá KÍ fara hini liðini í bólkinum – Sparta Prag og Tallinn – at spæla. Tann dystin fer Ove Nysted at hyggja at. KÍ skal fríggjadagin klokkan 17 spæla ímóti Sparta Prag og sunnudagin klokkan 15 ímóti Tallinn.

Í fjør legði KÍ í Finnlandi fyri ímóti eysturríkska Landhaus, og tá var tað púra óvæntað, at KÍ vann 2–1.

– Eg rokni við, at vit hesa ferð hava torførastu uppgávuna í fyrsta dystinum. Vit kenna ikki mótstøðuliðini nakað serligt, men vit rokna við, at Tallinn er veikasta liðið. Men tað verður ivaleysa stór avbjóðing hjá okkum, segði KÍ venjarin fyrrapartin í gjár, tá KÍ akkurát var komið aftur á gistingarhúsið eftir fyrstu venjingina, og tey vóru farin undir at fáa alt í rættlag og innrætta seg á staðnum, har tey skulu halda til inntil eftir vikuskiftið.